

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 05 - 2013

# Mugu finna stórar oljukeldur skal framleiðslan halda sær

Skal norska oljuævintýrið halda fram, so skulu gerast stór nýggj fund á landgrunninum, tí verandi framleiðsla heldur bara til 2025 skrivar Dagens Næringsliv. Tilfeingið í norsku undirgrundini heldur ikki ævigt, og sjálvt um seinastu stóru fundini Johan Sverdrup og Johan Castberg hava skapt nýtt bjartskygni, er tørvur á at finna uppaftur fleiri nýggjar oljukeldur. Soleiðis sum støðan sær út í dag, heldur núverandi framleiðslan ikki til eftir 2025. Uttan nýggj stór oljufund fer framleiðslan at minka og virðisøkingin somuleiðis eftir 2020, skrivar Olju- og orkustovnurin í eini frágreiðing um arbeiðið at lata upp nýggjan part av Barentshavinum. Og tørvur er á nýggjum ótroyttum økjum. Í 2040 skal helvtin av norsku oljuframleiðsluni koma frá økjum, sum enn ikki eru latin upp fyri olju- og gassleiting. Tí er framhaldandi brúk fyri stórum íløgum í framtíðar leiting. Nakað, sum enn ikki tykist vera nakar trupulleiki, Nógvar fyritøkur hava seinastu tíðina sagt, at tær eru sinnaðar at gera stórar íløgur í framtíðar olju- og gassleiting. Tað, sum kann varðveita framleiðsluna eftir 2025, er olja og gass, sum enn ikki er funnið. Tí er greitt, at tú má leita fyri at finna. Leitingin má halda fram fyri, at vit kunnu varðveita framleiðsluna móti endanum av okkara analysutíðarskeiði, og longur fram í tíðina er tað uppaftur meira týðandi, sigur Jan Bygdevoll, stjóri fyri prognosum, analysum og data í Oljudirektoratinum sambært Dagens Næringsliv.